**Skrátal:** 44201/102
**Máltal:** 9801105/5/VJ

# Handilsskúlin

*Lærugreinakunngerð* *September 2000*

## Marknaðarførsla C

*Endamálið*

1. Endamálið við undirvísingini er, at næmingurin fær grundleggjandi kunnleika til marknaðarviðurskifti og samspælið millum fyritøku og brúkara í einum marknaðarvendum samfelagi. Harafturat verður dentur lagdur á, at næmingurin fær eina fatan av stevnumiði, starvshátti og arbeiðsuppgávum hjá virkinum, eins og samskiftinum millum virkið og umhvørvi tess. Næmingurin skal eisini fáa innlit í viðurskiftini millum virkini, bæði heima og í altjóða høpi.

*Undirvísingin*

2. Næmingurin skal
- greiða frá samfelagsgongdini, sum hon hevur ávirkað tillagingartørvin hjá virkjum, við atliti at serligum tiltøkum, ið eru marknaðarvend,
- greiða frá grundleggjandi hugskotum og aðalmálum, ið eru grundarlagið undir virkseminum hjá virkinum,
- fáa eina fatan av, at søluarbeiði er viðkomandi, tá ið vørur og tænastur verða seldar, og at hetta hevur týdning í privatum og almennum virksemi, eins og á stovnum,
- greiða frá, hvørjar broytingar eru farnar fram í vørunýtslu og tænastuveitingum og broyttu nýtaraviðurskiftunum, ið hava staðist av hesum framvøkstri,
- greiða frá viðurskiftum, ið gera av kappingarháttin og kappingarstøðuna, og hvussu hetta ávirkar sølumøguleikar og marknaðartiltøk,
- vita um hugtakið "málflokkur", og kunna greiða frá, hvønn týdning, ið málflokkurin hevur, tá ið virkið fyrireikar søluátak,
- vera við í tiltøkum og metingum, ið viðvíkja kappingarráðum, hvussu tey verða brúkt og kunnu stuðla upp undir marknaðarátøk,
- duga at lýsa og greina kappingarstøðuna hjá virkinum, m.a. við at savna inn marknaðartilfar og meta um hetta,
- greiða frá høvuðslutum í lóggávuni, ið viðgera handil við vørum og tænastum og kann ætla um lógarheimildina í ítøkiligum tiltaki,
- lýsa mannagongdir, ið stýra goymslu, keypi og sølu og vera við, tá ið hesar verða settar í verk,
- prógva vitan um søluátøk í ymsum samanhangum, og
- duga at nýta viðkomandi framløguhættir.

HOYVÍKSVEGUR 72 • POSTRÚM 3279 • FO-110 TÓRSHAVN
TEL: +298 35 50 50 • FAKS: +298 35 50 55 • E-MAIL: UMMS@UMMS.FO

*Innihaldið í undirvísingini*

3. Lesipensum í sambandi við evnini, ið eru nevnd undir 3.1-3.11, er 200 síður.

3.1 *Samfelagsbroytingar og týdningur teirra*
Við í hesum broytingum eru broytingar í smásølu- og heilsøluvirksemi, søluvirksemi á framleiðsluvirkjum og tænastufyritøkum, umframt samfelagsgongdin, ið hevur skundað undir hesar broytingar.

3.2 *Hugskot og aðalmál hjá virkinum*
Serligur, dentur verður lagdur á tann týdning, ið hesi hava fyri stakeindirnar og samskipan av virkseminum í virkinum.

3.3 *Søluvirksemi og týdningur tess*
Søluarbeiðið og grundleggjandi týdningur tess fyri virkið verður lýst, uttan mun til vinnugrein og ognarviðurskifti.

3.3 *Brúkaraviðurskifti*
Viðgjørd verða viðurskifti á brúkaramarknaðinum. Tørvvarði Maslows verður viðgjørdur saman við keyps- og nýtsluvanum. Undir hesum verða viðgjørdar keypsorsakir, hvaðani og nær verður keypt, og hvussu nýtslan verður sett saman. Roknað verður fram til keypiorkuna. Keypiatburðurin verður greinaður, við atliti at avgerðum, tá ið keypt verður, hvør tekur avgerðir, og nær og hvussu tær verða tiknar. Partur av hesum er, hvussu eftirspurningurin verður ávirkaður av mótaráki, árstíðar- og marknaðarsveiggji.

3.4 *Kappingarviðurskifti*
Næmingurin skal læra um kappingarviðurskifti, herímillum hvørjir kappingarneytarnir eru, og hvussu kappingarráðini kunnu elva til trúgvar keyparar. Marknaðarprísur, útboð og eftirspurningur verða eisini viðgjørd.

3.5 *Málbólkur*
Viðgjørt verður í stuttum, at á brúkaramarknaðinum eru nýtararnir ikki einsháttaðir, men kunnu verða flokkaðir eftir tørvi, nýtslu og kappingarráðum, ið ávirka teir.

3.6 *Marknaðarførsla*
Kappingarráðini verða viðgjørd við høvuðsdenti á viðurskiftini á brúkaramarknaðinum. Hesi evni verða viðgjørd:
- Vøran og heildarveitingin í tænastuhøpi, herundir framvøkstur og tillaging.
- Tænastudygd og vørudygd, og tann týdningur, ið hesar hava fyri tað, ið vøran kostar.
- Vøruúrval, herundir samanseting og tillaging.
- Vørupakking, herundir sølulíkindi, tekniskir eginleikar og umhvørvisfyrilit.
- Tænasta, herundir kundatænasta undan søluni, samstundis og eftir søluna.
- Prísáseting, ið er grundað á kostnaðarrokning við virðing fyri keyparum og kappingarneytum.
- Lýsingar, herundir miðlar, lýsingarboðskapur og lýsingarkostnaður.

- Persónlig søla, herundir persónligir eginleikar og verumáti hjá seljaranum, kundaeginleikar og kundatænasta, serstakliga í smásølu.

3.7 *Marknaðarkanning*
At gagnnýta tilfar, ið er fingið til vega í marknaðarkanningum, umframt ætlaði marknaðartiltøk. At leggja upp fyri ivasomum upplýsingarkeldum og metingarfortreytum, ið tílíkt tilfar kann vera fongt við.

3.8 *Lóggáva*
Viðgjørdir verða lógarkarmarnir, ið snúgva seg um at keypa og selja vørur og tænastuveitingar.

3.10 *Sølustýring, keyps- og goymslustýring*
Hugtøk, ið verða brúkt í sambandi við:
- goymslu og søluumferð
- miðalgoymslu
- skiftispunkt
- skiftisíkast og skiftisavkast
- bruttovinning og bruttoavkast
- tænastudygd
- gjaldstreytir
- latanartreytir
- INCO-terms
- avsláttur og eykaágóði (bonus)
- keypi
- vali av útvegara
- goymslustýring

Í stýringini verða lyklatøl roknaði við hond og við teldu.

3.11. *KT*
Kunningartøkni er partur av undirvísingini, við serligum denti á tær telduskráir, ið tæna endamálum í sambandi við omanfyri nevndu fakøki, eins og leiting í altjóða teldugrunnum og á nýtslu av skrivi- og framløguamboðum.

3.12 *Skrivligt arbeiði*
Skrivliga arbeiðið fer fram lutvíst heima og lutvíst í flokkinum. Skrivliga heimaarbeiðið fevnir um 5 smærri uppgávur, sum lærarin rættar og ger viðmerkingar til. Skrivliga arbeiðið skal vera eitt natúrligt framhald av dagliga arbeiðinum við evnunum, ið eru nevnd frammanfyri og á tann hátt hjálpa næminginum at fáa eina djúpari fatan av høvuðspurningunum í marknaðarførslu.

*Prógtøkan*

4. Hildin verður ein munnlig próvtøka.

4.1 Munnliga próvtøkan fevnir um próvhoyring í ólisnum tilfari. Spurningarnir skulu tilsamans umboða alt tað uppgivna tilfarið. Próvtakarin fær umleið 20 minuttir til

fyrireikingar, og tá er vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 3 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

**4.2** Næmingar, ið fara til próvtøku eftir vanligum treytum, geva upp 160 síður av lesipensum.

**4.3** Fyri sjálvlesandi og næmingar, sum fara til próvtøku eftir serligum treytum, er próvtøkupensum tað sama sum lesipensum.

**4.4** Til fyrireiking og próvhoyring skal próvtakarin hava útflýggjað rein eintøk av próvtøkutilfarinum. Í fyrreikingarrúminum kann próvtakarin nýta egnar uppskriftir og teir orðalistar, sum eru útflýggjaðir í sambandi við undirvísingina, umframt allir teir tekstir, sum eru tilskilaðir í lesipensum. Til tess at styðja framløguna kann próvtakarin undir próvhoyringini brúka tær uppskriftir, hann hevur gjørt í fyrireikingartíðini, men eitt beinleiðis handrit til upplesturs telur ikki uppeftir í dømingini.

**4.5** Í dømingini verður dentur lagdur á, at próvtakarin dugur at greina útflýggjaða tilfarið í sambandi við spurningin sjálvstøðugt, og dugir at nýta fakmálið við hóskandi framløguhátti.

**4.6** Givið verður 1 próvtal fyri munnliga avrikið. Próvtalið verður givið við støði í einari heildarmeting.